## Nú verður hann liggjandi

Skiparin á sjórænaratrolaranum Nemanskiy fekk í gjár 50.000 norskar krónur í bót fyri fleiri brot á altjóða siglingarreglur og fyri at vera rýmdur úr norksari havn, eftir at skip hansara var tikið. Norsku fjølmiðlarnir siga, at reiðaríið og skiparin skylda nú norskum myndugleikum og umboðsmonnum umleið 120.000 krónur. Tað verður ikki hildið serliga sannlíkt, at pengarnir verða goldnir, og tí verður helst Nemanskiy liggjandi í Noregi hesaferð.



## Nógvir tráðumenn

Á hvørjum ári fara fleiri túsund fólk at veiða laks í teimum nógvu íslendsku áunum, og okkurt bendir á, at áhugin fyri hesum veiðihátti er veksandi. Í hvussu er hevur felagið hjá tráðumonnunum í Reykjavík ongantíð fingið so nógvar umsóknir um veiðiloyvi sum í ár. Freistin at søkja um at sleppa at veiða laks í áunum í høvuðsstaðarøkinum í summar var úti í gjár, og tá høvdu næstan 2.300 søkt. Tað er umleið 300 fleiri enn í fjør.

# Føroyingar drekka meira

**Men samstundis eru vit vorðin meiri mentað í okkara drykkjuvanum skilt á tann hátt, at meðan inntøkan av víni og øli veksur, so minkar sølan av brennivíni. Tað vísa hagtøl hjá Rúsdrekkasølu Landsins**

RÚSDREKKA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Smirnoff vodka er ovast, men vodka í heila tikið eigur fýra av teimum fimm fremstu plássunum hittlistanum*
*Mynd: Leo Poulsen*

Tað skerst ikki burtur. Føroyingum dáma sær alsamt betur at fáa sær ein upp í nevið. Sølan hjá Rúsdrekkasølu Landsins talar sítt týðiliga mál í so máta.

Men tað eru kortini tendensir í rúsdrekkavanunum hjá føroyingum, sum eru at fegnast um. Tað metir í hvussu er stjórin á Rúsdrekkasøluni, Elsa Maria Holm Olsen.

– Tað hevur verið ein klokkuklárur tendensur seinastu árini, at føroyingar drekka meiri og meiri av øli og víni, meðan sølan av sterkaru sløgunum spakuliga minkar, sigur Elsa Maria Olsen

Verður hugt eftir hagtølunum sæst, at samlaða nýtslan er alsamt vaksandi, eisini tá tað snýr seg um sterkaru sløgini. Men í mun til vøksturin av víni og øli minkar nýtslan av sterkari rúsdrekka kortini.

Eitt annað, sum er vert at leggja til merkis, er, at við í vøkstrinum av sterkari løgi er eitt nú RTD (Ready To Drink), sum umfatar Bacardi Breezer og Smirnoff Ice sum bæði eru blandað framman undan. Eisini er talan um eina beinleiðis minking í tí sum nevnist Vodka Shot, meðan tað er ein vøkstur í Hedvin Shot, sum hevur munandi minni alkoholinnihald.

Í hesum sama bólki finst eisini bitter og likør, sum traditionelt hava heldur lægri alkoholinnihald enn vanligt brennivín, og sum eisini umboðað ein vøkstur í søluni.

Annars er tað nógv best umtókta slagið av brennivíni Vodka. Sambært Elsu Mariu plagdi Akvavit at vera hitt best umtókta, men nú er tað altso Vodka.

– Og tað er eisini eitt stig rætta vegin at fáa fólk at drekka veikari sløg, tí Akvavit verður traditionelt drukkið óblandað, meðan vodka aloftast verður blandað, vísir Elsa Maria Holm Olsen á.

### Veikari øl

Alt hetta merkir, at hóast talan altso er um ein vøkstur í søluni í bólkinum, sum verður nevndur Spiritus, upp á góð 6%, so stavar ein partur av hesum vøkstri frá størri sølu av drykkjuvørum undir 20-25alc%.

Verður síðani hugt at Víni er støða hon, at har er talan um vøkstur innan øll vínsløg.Bæði tá talan er um reyðvín, hvítvín, rosévín og mousserandi vín er ein vøkstur. Samlað er talan um ein vøkstur beint oman fyri 9%.

Reyðvín er nógv best umtókt. Í fjør seldi Rúsan fleiri enn 230.000 litrar av reyðvíni, og tað er ein vøkstur í mun til 2006 upp á 16.000 litrar ella 7,37%

Hvítvín er somuleiðis vaksandi og í fjør seldi Rúsan 102.000 litrar móti 93.000 litrum í 2006, ein vøkstur upp á 9.000 litrar, svarandi til smá 10%.

Verður so hugt nærri at ølinum sæst, at her er eisini talan um ein vøkstur, og eins og í førnum brennivín verður drukkið meiri av tí veikara ølinum og minni av tí sterkara.

Vøkstur er í báðum styrkisflokkum, men veikara ølið veksur meiri enn tað sterkara. Veikara ølið er vaksið úr smáum 650.000 litrum í 2006 til 695.000 litrar í fjør, ein vøkstur upp á 7%. Sterkara ølið er vaksið úr 430.000 litrum upp í 460.000 litrar.

Tað finnast tvær høvuðsorsøkir til økta ølsalgið.

Annað er, at loyvt bleiv at selja øl í dósum frá 1. juli í ár, og hitt er, at vit byrjaðu at selja specialøl í heyst. Bæði góvu eina munandi øking í ølsøluni, sigur Elsa Maria Holm Olsen.

### Liggja væl

Stjórin á Rúsdrekkasølu Landsins sigur, at tey hava sett trý tiltøk í verk til tess at royna at »læra« føroyingar at drekka sunnari.

– Vit hava víðkað úrvalið av betra víninum og minka úrvalið av tí heilt bíliga, vit hava sett tað betra vínið á hillarnar í eygnahædd og síðst, men ikki minst hava vit lagt stóran dent á at útbúgva okkara starvsfólk, so tey kunnu geva eina munadygga vegleiðing innan vínøkið, sigur Elsa Maria Holm Olsen.

Við hesum tiltøkum hevur tað eydnast at hækka meðalprísin pr. fløsku á 75 cl úr 68,96 í 2005 upp í 75,53 í fjør á reyðvíni, og úr 65,88 í 2005 á hvítvíni upp í 68,77 í fjør. Tá er møguligur prísvøkstur íroknaður, men talan er kortini um eina øking.

Alt hetta merkir, at hóast føroyingar hava økt um inntøkuna av rúsandi drykkjum, so vísir tendensurin greitt, at vit leggja okkum alsamt meiri eftir teimum veikaru sløgunum.

Tað merkir so eisini, at vit hóast økta sølu av rúsdrykkjum, støðugt megna at halda okkum undir sjey litrar av reinum alkoholi pr. persón yvir 15 ár um árið. Og tað ger, at vit liggja lægstir í øllum norðanlondum.

Verður roknað við øllum íbúgvum liggja vit í skrásettum alkoholi niðri á 5,2 litrum um árið. Her hevur verið upplýst, at føroyingar drekka 13% av óskrásettum alkoholi um árið, men hetta er eitt tal, sum Elsa Maria Holm Olsen loyvir sær at ivast í, tí heimabrygging og smugling koma neyvan í nánd av 13%.

Samlað ger hetta, at vit liggja beint yvir Íslandi á 6%, meðan grannarnir fyri norðan liggja á 5,9%. Viðmerkjast skal, at hetta eru tøl fyri 2005.

– So sæð í einum norðurlendskum ljósi stendur als ikki so illa til við drekkaríi í Føroyum, heldur Elsa Maria Holm Olsen, stjóri á Rúsdrekkasølu Landsins.

**Alkohol inntøka pr. persón pr. ár (2005)**

| | Skrásett | ikki skrásett | tilsamans |
|---|---|---|---|
| Finland | 8,2 | 2,3 | 10,5 |
| Svøríki | 5,4 | 3,0 | 8,4 |
| Noregi | 5,0 | 1,7 | 6,7 |
| Danmark | 9,3 | 1,8 | 11,1 |
| Ísland | 5,5 | 0,4 | 5,9 |
| Føroyar | 5,2 | 0,8 | 6,0 |

**Best umtóktu sløgini Reyðvín:**

Chill Out Cabernet 3 l
Grain d'Oc Merlot 3 l
Vito Primitivo 3 l
Tabiso Shiraz 3 l
Santa Cabas Cabernet Sauv. 0,75 l

**Hvítvín:**
Montalto Catar/ Chardonney 3 l
Don Garcia Blanc 1 l
Chill Out Chardonnay 3 l
Fray Leon Chardonnay 1 l
Sittmann Silvaner Spatlase 0,75l

**Brennivín:**
Smirnoff Vodka 0,7 l
Aalborg Taffel Akvavit 0,7 l
Commander Vodka 0,7 l
Fishman Vodka Shot 0,7 l
Smirnoff Vodka 0,35 l

**Øl, veikt:**
Føroya Bjór veðr
Føroya Bjór Classic
Tuborg grøn
Carlsberg pilsner
Tuborg dósir

**Øl, sterkt**
Føroya Bjór gull
Tuborg guld
Føroya Bjór jólabryggj
Føroya Bjór Slupp
Carlsberg sort guld dósir

Viðmerkjast skal, at søla frá depotum hjá Førya Bjór og Restorff eru ikki við í hagtølunum